GJALDSTOVAN

# Útbjóðingarskriv

Viðvíkjandi serfrøðingi til Gjaldstovuna

# INNIHALD

1. Serfrøðingur til Gjaldstovuna 3
   a. Yvirskipað 3
   b. Uppgávan 3
   c. Væntað tímatal og arbeiðsstaður 3
   d. Krøv til serfrøðing 4
   e. Krøv til tilboð 5
2. Meting av tilboðum 5
   a. Mannagongd í sambandi við meting av tilboðum 5
3. Hentar upplýsingar 9
   a. Spurningar 9
   b. Tilboðsfreist og teldupostadressa til avhendan av tilboði 9
   c. Trú og heiður váttan 10
4. Tillutan av sáttmála og endi á útboði 10

# 1. Serfrøðingur til Gjaldstovuna

## *a. Yvirskipað*

Gjaldstovan vil við hesari áheitan bjóða út serfrøðing í sambandi við innliman av skúlum í Skúlanet.

## *b. Uppgávan*

Uppgávurnar eru:

- Vera samskiftisliður millum stovnin og tann, sum stendur fyri tøkniliga partinum
- Veita tekniskar greiningar av skúlunum í sambandi við verkætlan
- At finna feilir og loysnir til teknisku trupulleikarnar sum uppstanda í sambandi við verkætlan
- Vera toghaldari í samband við verkseting
- Annað í sambandi við verkætlanina.

## *c. Væntað tímatal og arbeiðsstaður*

Gjaldstovan væntar umleið 900 tímar í virknari arbeiðstíð um árið. Serfrøðingurin skal skipa sína arbeiðstíð í mun til tær verkætlanir, sum eru og møguligt skal vera at koma í samband

við serfrøðingin í vanligari arbeiðstíð. Komandi serfrøðingurin skal, innanfyri rímiligt mark, eisini góðtaka at arbeiða skiftandi tíðir, um neyðugt.

Arbeiðsstaðurin er Gjaldstovan og verksetan verður runt á teimum ymisku skúlunum. Gjaldstovan er sinnað at samráðast um møguligar broyttar fyritreytir í verkætlanini, ið krevja broytingar í sáttmálanum, sum t.d. tímatal og arbeiðstíðir.

## *d. Krøv til serfrøðing*

Serfrøðingurin skal vera ein nevndur persónur. Um talan er um fyritøku, ið velur at bjóða, so skal vera viðmerkt, hvør persónurin er, ið skal standa fyri uppgávuni.

Serfrøðingurin skal byrja skjótast gjørligt.

Serfrøðingurin skal í minsta lagi hava:

- útbúgving á bachelor stigi innan KT ella líknandi
- 5 ára skjalprógvaðar royndir við uppgávum í KT verkætlanum.

Tað er umráðandi, at serfrøðingurin:

- arbeiðir skipað
- hevur góð samstarvs- og samskiftisevni
- hevur góða heildarfatan av KT
- hevur lætt við at seta seg inn í nýggjar skipanir
- hevur serkunnleika innan net tøkni

### *e. Krøv til tilboð*

Í tilboðnum skal vera upplýst:

- navn og CV hjá serfrøðingi
- navn og skrásetingarnummar hjá fyritøku
- prísur pr. tíma uttan MVG
- frágreiðing um, hvussu krøvini til serfrøðingin, nevnd omanfyri, verða lokin
- frágreiðing um aðrar viðkomandi útbúgvingar, vitan og royndir
- frágreiðing um viðkomandi kundar, serfrøðingurin hevur havt og hvørjar viðkomandi uppgávur, serfrøðingurin hevur loyst.

## 2. Meting av tilboðum

Sáttmálin verður tillutaður sambært ásettu tillutanartreyt, sum er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og førleikar. Gjaldstovan brúkar fylgjandi vekting:

1. Prísur 50%
2. Førleikar 50%
    a. Aðrar viðkomandi útbúgvingar 20%
    b. Viðkomandi kundar serfrøðingurin hevur havt, og hvørjar viðkomandi uppgávur serfrøðingurin hevur loyst 30%

### *a. Mannagongd í sambandi við meting av tilboðum*

I) Karakterstigi

Innkomin tilboð fáa karakter eftir niðanfyristandandi stiga:

| Karakterur | Týdningur |
|---|---|
| 80 - 100 | **Avbera gott**<br>Verður givið tilboðum við eginleikum ella góðsku, sum betra um loysnina, ella á annan hátt hava við sær sera stóra virðisøking / sera góður prísur. |
| 60 - 80 | **Gott**<br>Verður givið tilboðum við eginleikum ella góðsku, sum betra um loysnina, ella á annan hátt hava við sær góða virðisøking / góður prísur. |
| 40 - 60 | **Rímiligt - sum væntað**<br>Verður givið tilboðum, sum lúka tørvin ella eru við til at loysa uppgávuna / prísurin er hvørki góður ella ivingarsamur. |
| 20 - 40 | **Heldur ófullíggjað**<br>Verður givið tilboðum, sum hava ávísar manglar í mun til at lúka tørvin. Uppgávan kann loysast við ávísum stríði / heldur ivingarsamur prísur. |
| 0 - 20 | **Ófullíggjað**<br>Verður givið tilboðum, sum hava manglar í mun til at lúka tørvin. Uppgávan kann loysast, men til eitt støði sum akkurát kann góðtakast / ivingarsamur prísur. |

II) Prísur, hvussu verður prísur útroknaður ?

Øll tilboð, sum lúka form- og minstukrøv, fáa stig fyri prísin millum 0 – 50.

Tilboðið við lægsta prísinum pr. tíma fær 50 stig. Restin av tilboðunum fáa stig í mun til lægsta prís pr. tíma. Um prísurin pr. tíma er lægri enn 500 kr. pr. tíma uttan MVG, verður prísurin pr. tíma settur til 500 kr. í samanberingini við aðrar prísir.

III) Førleikar, hvussu verða stig fyri førleikar givin ?

Førleikar eru býttir upp í tilvísingar fyri:

a. *aðrar viðkomandi útbúgvingar 20%*
b. *viðkomandi kundar, serfrøðingurin hevur havt og hvørjar viðkomandi uppgávur, serfrøðingurin hevur loyst 30%*

a. *aðrar viðkomandi útbúgvingar.*

Aðrar viðkomandi útbúgvingar verða mettar ein og ein og fáa eitt samlað stigatal frá 0 – 20. 20 stig kunnu vera givin fyri viðkomandi útbúgvingar, og 0 stig verða givin fyri ongar aðrar viðkomandi útbúgvingar. Tað verður mett positivt, meira viðkomandi útbúgvingarnar eru. Við viðkomandi útbúgvingum verður sipað til, í hvønn mun serfrøðingurin hevur aðrar viðkomandi útbúgvingar, sum t.d. eina útbúgving á master stigi og onnur certifikat. Tilboðsgevari skal ikki lata inn fleiri enn tvær aðrar viðkomandi útbúgvingar.

b. *Viðkomandi kundar serfrøðingurin hevur havt, og hvørjar viðkomandi uppgávur serfrøðingurin hevur loyst*

Frágreiðing um viðkomandi kundar og viðkomandi uppgávur verða mettar ein og ein og fáa eitt samla stigatal frá 0 – 30. 30 stig kunnu vera givin fyri tveir viðkomandi kundar og uppgávur, og 0 stig verða givin fyri ongar viðkomandi kundar ella uppgávur. Tað verður mett positivt, meira viðkomandi kundarnir og uppgávurnar eru. Við viðkomandi kundum og uppgávum verður sipað til, í hvønn mun frágreiðingin prógvar innlit í líknandi uppgávum, sum lýst í pkt. 1, og um serfrøðingurin hevur havt viðkomandi kundar og

hvørjar viðkomandi uppgávur, serfrøðingurin hevur loyst. Tilboðsgevari skal ikki lata inn fleiri enn tvey dømi uppá viðkomandi kundar og uppgávur.

IV) Samlað meting

Tá ið tilboðið er mett sambært tillutanartreytunum, verður ein samlað meting framd, sum er grundað á stigini, sum eru givin fyri tillutanartreytirnar. Dømi um samanberingar eru lýst her:

Tilboð 1: Serfrøðingurin hevur eina aðra viðkomandi útbúgving. Hetta gevur t.d. 10 stig. Serfrøðingurin hevur eisini havt ein viðkomandi kunda og uppgávu. Hetta gevur t.d. 15 stig. Prísurin pr. tíma er 500 kr. uttan MVG.

Tilboð 2: Serfrøðingurin hevur tvær viðkomandi útbúgvingar. Hetta gevur t.d. 20 stig. Serfrøðingurin hevur eisini havt ein viðkomandi kunda og uppgávu. Hetta gevur t.d. 15 stig. Prísurin pr. tíma er 750 kr. uttan MVG.

Tilboð 3: Serfrøðingurin hevur tvær viðkomandi útbúgvingar. Hetta gevur t.d. 20 stig. Serfrøðingurin hevur eisini havt tveir viðkomandi kundar og uppgávur. Hetta gevur t.d. 30 stig. Prísurin pr. tíma er 900 kr. uttan MVG.

Stigatal samanlagt = "stig fyri aðrar viðkomandi útbúgvingar" og "viðkomandi kundar og uppgávur" + "lægsti prísur" / "tilboðsprísur" * 50

Tilboð 1: 10 + 15 + 500/500 x 50 = 75

Tilboð 2: 20 + 15 + 500/750 x 50 = 68

Tilboð 3: 20 + 30 + 500/900 x 50 = 78

Tilboð 3 hevur sostatt hægst samlaða stigatalið. Sáttmálin verður tillutaður tilboðnum, ið hevur hægst samlaða stigatalið.

# 3. Hentar upplýsingar

## *a. Spurningar*

Tilboðsgevari hevur møguleikan at fáa fleiri upplýsingar við at seta skriftligar spurningar. Spurningar skulu sendast til Róa Mohr Jónsson á:

roimohr@gjaldstovan.fo

Spurningar, ið eru settir fyri 08.09.2023 kl. 16.00, verða svaraðir í seinasta lagi týsdagin 12.09.2023 kl. 16.

Spurningar verða svaraðir skrivliga og dulnevnt. Øll svar kunnu síggjast á keypsportal.fo í seinasta lagi 12.09.2023.

## *b. Tilboðsfreist og teldupostadressa til avhendan av tilboði*

Tilboð skal latast inn við at senda teldupost til Róa Mohr Jónsson á:

roimohr@gjaldstovan.fo

Tilboð kann ikki latast inn á annan hátt.

Freistin at lata inn tilboð er:

***15.09.2023 kl. 13.00***

Tilboð, ið verða latin inn aftaná hesa freist, verða ikki viðgjørd.

### c. *Trú og heiður váttan*

Tilboðsgevari skal samstundis, sum boðið verður latið inn, vátta við trú og heiður, í hvønn mun viðkomandi hevur falna almanna skuld. Tilboðsgevari skal brúka *Trú og heiður váttan* í sambandi við avhendan av tilboði.

## 4. Tillutan av sáttmála og endi á útboði

Útbjóðari tekur avgerð um at tilluta sáttmálan, tá ið útbjóðari hevur gjørt av, hvat er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og førleikar.

Útbjóðari treytar sær rættin til ikki at taka av nøkrum tilboði.

Sjálvt um sáttmálin verður tillutaður, eru tilboðsgevarar bundnir av sínum tilboði, til útbjóðari hevur undirskrivað sáttmálan.

Útreiðslur, sum tilboðsgevarar hava í sambandi við hetta útboð, eru óviðkomandi fyri útbjóðara. Hetta er eisini galdandi, um útbjóðari tekur avgerð um, at ikki taka av nøkrum tilboði.

| **Virksemi** | **Dagfesting, kl.** |
|---|---|
| Freist at senda inn spurningar, sbrt. pkt. 4.a. | 08.09.2023 |
| **Tilboðsfreist, sbrt. pkt. 5.a.** | 15.09.2023 kl. 13.00 |
| Væntandi tillutan av sáttmála | Seinast í september |

Vit gleða okkum at fáa tykkara tilboð.

Vinaliga

Rói Mohr Jónsson
Fulltrúi – Keyp Landsins
Gjaldstovan